## VIÐMERKINGAR

# 90% fyri at broyta rúsdrekkalógina

HEÐIN D.
POULSEN



Uppskotið hjá landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm um, at broyta rúsdrekkalógini er kærkomi hjá tí vanliga føroyinginum. Tí vanliga føroyinginum, sum við gleði og uttan at taka skaða av tí, kann njóta eina øl ella eitt glas av víni. Uppskotið ger lívið hjá tí vanliga føroyinginum eitt sindur hugnaligari, sum í góðum lag vitjar stevnir, festivalar og onnur mentunartiltøk í egnum landi, har hann nú við góðari samvitsku kann keypa sær eina kalda á staðnum.

Mótstøðan frá afturhaldsrørsluni er hørð, men tíbetur er tað bert ein lítil minniluti, har flestu oddafiskarnir eru kendir fyri teirra afturhaldssinnaðu og ekstremu hugsanir. Tað er í hesum høpi umráðandi altíð at hava í huga, at flestu føroyingar hava ongan trupuleika av rúsdrekka, og tey ungu í Føroyum eru als ikki verri fyri enn í okkara grannatjóðum, sum afturhaldsrørslan vil gera tey til. Hevði ein fólkaatkvøða verið um hesa broyting, hevði hon allarhelst fingið eini 90 % undirtøku frá fólkinum.

Sjálvt um Fyribyrgingarráðið og øll onnur, sum hava havt uppskotið til hoyringar, viðmæla uppskotinum hjá landsstýrismanninum, so eru framvegis summir politikkarir sum vita betur og siga at lógini ikki eigur at verða broytt. Eitt av teirra sjónarmiður er, at hetta er bara fyrsta stigi at liberalisera og verður uppskotið samtykt er væntandi, at fleiri liberaliseringar fylgja og tí er betur einki at gera, sjávt um Fyribyrgingarráðið ikki metur "*at broytingarnar fara at føra við sær økta alkoholnýtslu ella hava aðrar óhepnar fylgjur*". Hesum taki eg partvíst undir við, tí sjálvandi kann tað væntast, at tað fara at koma fleiri uppskot um broytingar. Tørvurin og livihátturin hjá tí einstaka broytist við tíðini og sjálvandi skal ein lóg til ein og hvørja tíð tillaga seg til samfelagið og ikki øvugt.

Tey somu fólkini, sum vóru ímóti Rúsdrekkasølu Landsins, eru í dag ímóti hesi broyting. Tey sum eru ímóti duga ella vilja ikki skilja, at meirilutin av Føroya fólki uttan trupulleikar umsita rúsdrekka uttan nakað sum helst himpr, og hví skuldi føroyingar verið so nógv verri enn onnur fólkasløg? At profilera sín politiska persón við at siga, at flestu føroyingar ikki duga at drekka við máta, er at niðurgera tann vanliga føroyingin.

Tað er rætt at fara hóvliga fram, og sjálvt um hetta er ein lítil broyting rætta vegin, so er at fegnast um, at Landsstýrismaðurin er komin so langt við uppskotinum. Næstu ferð, ja tá verður tað kanska uppskotið, sum fer at gera tað møguligt hjá vanliga føroyinginum at keypa vínið á sama stað, har hann keypir steikina.

# 5 málspurningar

## Var Oynstoyn í Svoys? Eg maini:Var Ainstain í Svais?

EYÐUN
Á BORG
á Borg á Argjum í
vársól 2006



Skal hatta landsnavnið stavast: Sveis, Svais, Schwaiz ella Schweiz? Man alt vera loyvt? Málsligt lógloysi?

Hendan UKREINA-skrivingin gjørdist ein verri føsil! Kanska betri ógjørt!? Nú høvdu vit júst vant okkum við tann lætta, einfalda, føroyska staviháttin: Ukreina, Sveis o.s.fr. Skúlabørnini halda tað sjálvandi eisini vera lættari at stava nøvnini á føroyskum.

Tey tilkomnu, haraftur-ímóti, sum meginpartin av lívi sínum bara hava sæð donsk (útlendsk) landakort, ja, teirra heilakyknur hava sjálvandi ilt við at venja seg við móðurmálsmenningina á landafrøðiliga økinum. Tað er ringt at fara frá kendu nøvnunum:

Ukra-ine, Schweiz, Ægypten, Elfenbenskysten, Polen, Italien, Kap Farvel,Shetland, New Zealand o.s.fr.

**5 spurningar**
Takk fyri spurningarnar, Dagfinn!

**1. spurningur:** Hví málnevndin ikki veit, at útlendskt ai verður skrivað ei á føroyskum!? Ja, man hon ikki vita tað? Annars visti eg ikki, at málnevndin nú góðtekur bæði UKREINA og UKRAINA! Hvør er annars í hasi málnevndini, og hvørjar heimildir hevur hon? Kann hon t.d. broyta skriftmálið?

**2. spurningur:** Mai, mais og kai! Jú, okkurt undantak er. Tað er tað í øllum málum.

Um eg góðtaki stavsetingina í donsku-føroysku orðabókini, sum Fróðskaparfelagið gav út í 1995? Jú, tað hugsi eg. Í hvussu so er, um stavsetingin er í samsvari við móðurmálsorðabókina. Annars er handan da.-fø. orðabókin eitt sindur ivasom í vissum førum. Mær dámar betur ta stóru, donsku-føroysku orðabókina, sum Stiðin gav út í 1998.

Stiðjaorðabókin góðtekur annars eisini mei! Tí haldi eg, at vit kanska heldur skuldu skrivað mei, sjálvt um eg altíð havi skrivað mai! Mei=moy??

Kanska eisini meis!? Nei, eg veit ikki. Vit hava jú orðið, meis, á føroyskum. Tað hevur fleiri týdningar (m.a. føsil)!

Orðið kai/kaj er danskt. Tað eitur bryggja, brúgv ella lending á føroyskum!

**3. spurningur:** Málførið (bygdamálið/dialektin) norðanfyri er avgjørt eisini føroysk tunga!

Latið okkum endiliga varðveita tey fjølbroyttu bygdamálini!

**4. spurningur:** Nei, at tvinga fólk man ikki loysa seg! Kortini hava vit eitt skriftmál og eitt bókstavarað. Tað er ørkymlandi at hava fleiri loyvdar stavimátar!

**Undirmeta tit ikki norðanfólk?**
Annars er ei neyvan ein trupulleiki hjá norðanfólki! Munnu norðanfólk ikki duga líka væl týskt sum sunnanfólk? (ein, klein, mein). Man nakar føroyingur norðan fyri Kaldbaksfjørð siga Oynstoyn ella Svoys í staðin fyri Einstein og Sveis? Nei, sjálvandi ikki.(Sambært móðurmálsorðabókini (hvørjumfall) er Sveis tað rætta, ikki Svais)!!

Haraftrat siga norðanfólk eisini Hoyni Heinesen (Heini Heinesen,orsaka, at eg eri persónligur)! Sagt verður oy í føroyska fornavninum, Heini, og ei í útlendska/danska eftirnavninum! Man eg ikki hava rætt, eysturoyartingmaðurin?

Sjálvandi hava norðanfólk heldur ikki nakran trupulleika av Ukreina! Handan ai-undanførslan heldur ikki!

Jú, kanska hevði tað ørkymlað onkran, um ein sveisari var sveisari á eini skipasmiðju!?

Hevði tað annars gjørt nakað, um norðoyingar søgdu oy í t.d. landsnavninum, Teilandi? Dømi: Baturin hja papa er í Toylandi!?

**5. spurningur:** Um eg haldi meg hava betri førleika enn málnevndin?! Hatta var verri! Nei, man tað vera? Fekk kortini einaferð eitt bræv við ð-villu frá hesi nevnd!? Ergo: Errare humanum est! (Tað er menniskjaligt at mistaka seg)! Vit mistaka okkum øll!

Hvussu skal eg svara? Sjálvrós er ikki tespiligt.Tú skalt heldur ikki seta ljós títt undir skeppuna. Lat meg siga tað soleiðis: Neyvan hevði eg gjørt vart við meg í bløðunum á hendan hátt, um eg ikki helt meg vera á heimavølli viðvíkjandi tí, eg skrivi um! Eg haldi meg jú til føroyskar skriftmálsreglur og móðurmálsorðabókina!

E.S Høvuðsætlan mín var annars at fáa fólk at siga UKREINA í staðin fyri UKRA-INE!!

Man Ukreina ikki fara at standa á plakatum og atgongumerkjum til landsdystin?

E.E.S. Hey,Heri! Skemtari er! Vanliga verða nøvn á býum ikki føroyskað! Skriva tú bara Hanoi og Saigon! Grønhøvdi, ja, hví ikki? Skuldu vit t.d. ikki sagt ella skrivað Fílabeinsstrondin? Hevði tað riggað betur við Elfenbenskysten ella Ivory Coast ella kanska Cote d´Ivoire? Var hatta franska rætt? Reunion kundi kanska itið Sameining ella Samljóð!? Heri segði mær annars nú ein dagin, at radioaktivitetur eitur útvarpsvirksemi á føroyskum! Eg maini tað! Nú varð eg drúgvur.

Boy, tit!

# Elektron, Fíggjarmálaráðið og Útvarpið

FINNUR
HELMSDAL
Tingmaður



Setti her fyri Bárði Nielsen, landsstýrismanni ein fyrispurning um Elektron. Hesin snúði seg í stutt um, at eg bað landsstýrismannin greiða frá, hvørji atlit hann hevði tikið ella ætlaði at taka, nú landsins partur í Elektron skal einskiljast. M.a. varð spurt um, hvussu landsstýrismaðurin ætlaði at tryggja, at persónsupplýsingar o.a., sum Elektron handfer ídag, framvegis verða handfarnir í tryggum umhvørvi. Í hesum lá sjálvsagt eisini, hvussu landsstýrismaðurin fór at tryggja sær, at tænastan, sum Elektron veitir í dag, framvegis verður veitt. Í hesum liggur eisini spurningurin um prís á tænastuni, sum í dag er sera lagaligur og kemur bæði landi og privatum stak væl við.

Men hvat ger landsstýrismaðurin. Jú, hann setir onkran juppi at svara fyrispurninginum, hesin slær upp á síðu 137 í onkrari skúlabók og lurtar annars eftir teimum liberalistu vinnulívsfólkunum, sum skýra Elektron sum vardan verkstað og fossila fyritøku. Og svarið er hareftir. Arrogant, fylt við liberalistiskum jargongið og ein óbúgvin slutur fyri ein slatur. Svarið prógvaði bara eitt, og tað er at svararin ikki er førur fyri at reflektera fyri fimm oyra.

Eg spurdi ikki, um vit hava lóggávu, sum skal eitast at tryggja slíkt virksemi. Haldi eg veit meira enn svararin um hesi viðurskifti, bæði her og aðrastaðni. Eg segði ikki, at landi skuldi tryggja trygdina á Elektron við at eiga nøkur partabrøv. Eg segði heldur ikki, at eg var ímóti, at Elektron skuldi einskiljast.

Tað, sum eg vildi við fyrispurninginum, var at spyrja landsstýrismannin um, hvussu hann ætlaði at tryggja sær, at vit fram vegis fara at hava eina eins góða, og eins trygga og kanska eisini eina bíliga tænastu, sum Elektron veitir ídag.

Um Elektron bara verður selt soleiðis uttan at fyrilit verða tikin, kann hugsast, at ein møguligur keypari býtur fyritøkuna upp, raðfestir eftir, hvussu viðkomandi metir inntøkumøguleikarnir fara at verða. Eg spurdi m.a. hvussu landsstýrismaðurin tryggjaði seg móti slíkum.

Fari við hesum at átala harðliga, bæði mátanum svarað er uppá, bæði frekt og jánkaslig og tí, at Bárður Nielsen, landsstýrismaður fer í tingið við ein slíkum svari. Viðkomandi, sum svarað hevur, prógvar bert eitt, at spurningurin als ikki er skiltur, og at evnini at reflektera ikki er serliga góð. Við at lata eitt slíkt svar fara ígjøgnum og á tingborð, gevur landsstýrismaðurin sínum starvsfólkum beinleiðis loyvi til at gera gjøldur burtur úr tingskipanini.

**Hvat ger Útvarpið**
Og hvat ger Útvarpið fríggjamorgunin tann 24. mars? Jú, teir lesa kritikkleyst upp úr skrivaða svarinum. Teir siga einki frá orðaskiftinum, sum stóðst av, at fyrispurningurin varð svaraður í tinginum. Hevði Útvarpið ómakað sær at lurta, so høvdu teir hoyrt, at tingmenn hartaðu Bárð Nielsen fyri mátan, fyrispurnimgurin varð svaraður, og somuleiðis fyri innihaldið í svarinum. Teir báðir Kristian Magnussen og Torbjørn Jacobsen góvu sítt góða íkast í orðaskiftið, og var ikki sørt at landsstýrismaðurin skifti tóna og orð. Og var eg ikki so bangin fyri lagnuni hjá Elektron eftir orðaskiftið, sum frammanundan. Men var tað ikki teksturin, sum uggaði, men tað sum landsstýrismnaðurin segði undir orðaskiftinum.

Tað er spell at ein fjølmiðil skal fara so lætt um tað, sum veruliga fer fram. Tað er spell, at ein fjølmiðil skal viðgera eitt so týdningarmikið mál so grunt og ókritiskt. Minsta mark er, at Útvarpið gevur sær stundir til at lurta eftir orðaskiftinum, um teir skulu viðgera ein fyrispurning frá einum tingmanni til ein landsstýrismann.

Fari við hesum at átala mátan Útvarp Føroya viðgjørdi fyrispurning mín um Elektron, og loyvi mær at vísa á, at tað er júst slíkur arbeiðsháttur sum ger, at líkasæla og vantandi vitan er meginreglan heldur enn undantakið.